Roskilde Festival 2000

Fyri 30. fer› ver›ur nú bo›i› til Roskilde Festival, har ein hópur av kendum og minni kendum nøvnum fara at vísa hvør dugur er í teimum

Eitt av árliga afturvendandi tiltøkunum í Danmark, sum ein hópur av føroyingum savnast til, er Roskilde festivalurin, sum vi› sínum vavstri av tónleiki og veistlu, og onkuntí› regni og rundudíki eisini, er rættuliga væl umtøktur millum ung, tey sum vilja vera ung, og annars øll vi› áhuga fyri tónleiki.

Nú um dagarnar var skráin fyri 30. Roskilde festivalin kunngjørd. 175 bólkar og einstaklingar skulu á pallin teir 4 dagar festivalurin er. Lagt ver›ur út hósdagin 29 juni, og helma› ver›ur ikki í aftur fyrr enn sunnudagin 2. juli, tá seinastu troyttu festival luttakararnir fara at stinga ni›ur í sekkin aftur.

Í samband vi› at hetta er 30. fer› at skipa› ver›ur fyri Roskilde festivalinum, hevur stórur dentur veri› lagdur á at fáa so nógvar og kendar bólkar og einstaklingar vi› sum gjørligt, umframt at onnur spennandi tiltøk eisni eru komin vi› á skránna, og hetta vísir seg at hava eydnast til fulnar.

Ov trongt

Funnist ver›ur ofta at at nógvir av bólkunum í spæla á Roskilde ikki eru serliga áhoyrara vinarligir, og at lei›slan fyri festivalin í alt ov stóran mun leggur seg eftir at fáa fatur á bólkum vi› høgum listarligum stø›i, heldur enn ta› fólki› vil hoyra. Av tí sama eru ta› eisini fleiri sum eisini heldur velja Midtfyns festivalin sum vanliga ver›ur hildin eina viku seinni. Á Midtfyns festivalinum eru ta› ofta meiri poppalig nøvn, sum eru at hoyra, og er ta› ikki techno, industrial metal og goth rokkur, sum hevur tín áhuga, so er Midtfyns festivalurin ta› betra bo›i›.

Umframt at ónøgd hevur veri› vi› nøvnini sum hava veri› at hoyrt, so hava eisini klagur um ymiskt anna› veri› frammi. Eitt nú eru ta› nógv sum halda at alt ov nógv fólk sleppa inn. Í 1998 vóru ikki færri enn 90.000 atgongumerkji seld, og hetta skapti ru›uleika á festival plássinum. Fyrireikararnir høvdu ikki tiki› hædd fyri at hesi 90.000 fólkini øll skuldu hava okkurt at eta og drekka, og at tørvur eisini var á hjá teimum at vitja okkurt av teimum til høvi› upsettu nátthúsunum.

Í 1999 avgjørdi lei›slan fyri Roskilde festivalin at avmarka tali› av atgongumerkjum til 70.000 Hesa avger› vóru tey flestu sum sluppu innum gir›ingarnar væl nøgd vi›. Umstø›urnar vóru mundandi betur, og fólk byrja›u at trívast aftur. Vert er kanska eisini at nevna at ve›ri› eisini skikka›i sær væl í fjør, og enda›i ta› ikki vi› runudansi framman fyri tann appelsingula pallin, har øll tey stóru nøvnini vanliga eru at hoyra, sum so ofta fyrr.

Pet Shop Boys og Pearl Jam

Ta› hevur eyndanst Leif Skov og hinum fyrireikarunum at samanseta eina spennandi skrá í ár. Millum tey stóru nøvnini, sum luttaka í ár, kunnu vit nevna Lou Reed úr New York, sum fyri stuttum gav út fløguna Ecstasy. Pearl Jam úr Seattle, sum eisini eru plátuaktuellir vi› Binaural. Live sum eru farnir at gera allsamt meiri um seg í Europa ver›a eisini at hoyra. Úr Bretlandi koma Irion Maiden, sum eru um at vera klárir vi› einari n‡ggjari útgávu. Pet Shop Boys, sum sjáldan eru at finna á palli, hava eisini játta› at leggja lei›ina fram vi› Roskilde. Vælumtóktu Gallagher brø›urnir úr Oasis vera eisini at hoyra og seinast og ikki minst so fara teir í Travis at seta fram spurningin Why Does It Always Rain On Me. Umframt hetta so koma nógvir gó›ir og minni kendir bólkar úr nógvum londum. Øll nor›anlondini eru umbo›a›i uttan Føroyar, og Íslendingar hava ikki minni enn tvey nøvn vi› á plakatini.

Av teimum 70.000 atgongumerkjunum sum eru til taks, ver›ur helmingurin, 35.000, seld í Danmark. Hin helvtin ver›ur send út um landoddarnar. Stórur áhugi er í útlandinum fyri Roskilde festivalinum, sum ber or› fyri at vera ein tann besti av sínum slag í Europa.

Atgongumerki

Til ber ikki at keypa atgongumerki til Roskilde festivalin í Føroyum, men áhuga›ir føroyingar hava møguleika fyri at seta seg í samband vi› Tivolis Billetcenter á Vesterbrogade í Keypmannahavn, sum umsitur atgongumerkjasøluna uttan fyri Danmark. Fyri smáar 1000 kr, kanst tú fáa nakrar ógloymandi dagar vi› øllum tí n‡ggjasta tónleikinum, umframt at tú hevur møguleika fyri at møta nógvum spennandi fólkum, og er tú heppin, so skínur sólin kanska eisini.

UK TOP 20 CHARTS

Singles

1 Bound 4 Da Reload - Oxide & Neutrino
2 Toca's Miracle - Fragma
3 Fill Me In - Craig David
4 The Bad Touch - Bloodhound Gang
5 Thong Song - Sisqo
6 Candy - Mandy Moore
7 Bugg'in Me - True Steppers ft. Dane Bowers
8 He Wasn't Man Enough - Toni Braxton
9 Flowers - Sweet Female Attitude
10 Crazy Love - MJ Cole
11 Per Sempre Amore (Forever in Love) - Lolly
12 The Best is Yet to Come - Scooch
13 Blow Ya Mind - Lock'n' Load
14 Never Be The Same Again
- Melanie C/ Lisa Left Eye Lopes
15 Private Emotion - Ricky Martin ft. Meja
16 Big Girl - Precocious Brats/Kevin and Perry
17 Who Feels Love? - Oasis
18 Deeper Shade Of Blue - Steps
19 Cry - System F
20 I Wanna Love You Forever - Jessica Simpson

Billboard

3arin

Mest seldu fløgur

1. Ymiskt - Now 45
2. Vengaboys - The Platinum Album
3. N Sync - No Strings attached
4. Toni Braxton - The Heat
5. Westlife - Westlife
6. Jessica Simpson - Sweet Kisses
7. Blink 182 - Enema of the State
8. A-Ha - Minor Earth/Major Sky
9. Soundtrack - South Park
10. Bellamy Broth. - Best of the Best
11. Bomfunk MC's - Freestyler
12. Ymiskt - Young Stars 5
13. Cargo - The Movie goes Party
14. Sash! - Trilenium
15. Madonna - American Pie
16. Modern Talking - Year of the Dragon
17. Red Hot Ch. Pep. - Californication
18. Bomfunk MC's - In Stereo
19. Kular røtur - Kular røtur
20. Ymiskt - Young Stars 5

Kelda: 3´arin

UK TOP 20 CHARTS

Singles

1 Play - Moby
2 Rejoad - Tom Jones
3 The Heat - Toni Braxton
4 Supernatural - Santana
5 Westlife - Westlife
6 Skull and Bones - Cypress Hill
7 Things To Make And Do - Moloko
8 Come On Over - Shania Twain
9 At His Very Best - Engelbert Humperdinck
10 Silver and Gold - Neil Young
11 Heliocentric - Paul Weller
12 The Man Who - Travis
13 The Woman In Me - Shania Twain
14 Brand New Day - Sting
15 Northern Star - Melanie C
16 Unleash The Dragon - Sisqo
17 2001 - Dr Dre
18 Automatic For The People - REM
19 The Writing's On The Wall - Destiny's Child
20 On How Life Is - Macy Gray

Kelda: BBC

Svara so!?

20 spurningar til Harley Bertholdsen

Navn: Harley
Bertholdsen
Føddur:
10/03/69
Giftur/trúlova›ur:
Hvørki
Starv:
Krambakallur
Nær byrja›i tú at spæla fótbólt:
Eg haldi at eg var seks ára gamal
Minnisríkasti dystur:
Eg haldi at ta› var steypafinalan í 1994, tá vit vunnu 2-1 á B71
Ringasta tap:
Ta› var seinasta sunnudag móti NSÍ
Føroya besti fótbóltsleikari:
Ta› má vera Todi Jónsson
Heimsins besti fótbóltsleikari:
Eg haldi at eg sigi Luis Figo
Heimsins besta felag:
Ta› er KÍ
Besti persónligi eginleiki:
Ta› mugu onnur døma um
Størsti persónligi veikleiki:
Eg haldi at ta› er mítt sinnalag
Størsta uppliving:
At vinna
Størsta vónbrot:
Ikki at gerast føroyameistari í 1996
Størsta ynski:
Ta› má vera at vinna greipuna aftur í ár
Best í sjónvarpinum:
Ta› er fótbóltur
Besti matur:
Allur føroyskur matur
Besti drykkur:
Mjólk
Hevur tú naka› frítí›arítriv:
Nei, ta› er bara fótbólturin
Hevur tú naka› motto:
At gera tingini so væl sum gjørligt